UTTAN ÚR HEIMI

# Vónaðu at Sharon fór at doyggja

**Bæði víðgongdir jødar og palestinar vónaðu, at ísraelski forsætisráðharrin fór at doyggja av hjartatilburðinum fyrrakvøldið**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

- Vit hava verið í synagogunum og biðið um, at Sharon skal ikki koma fyri seg aftur, segði Itamar Ben Gvir, sum er ein av leiðarunum í tí víðgongda jødiska felagsskapinum Kach, sum er bannaður í Ísrael.

- Sharon hevur ábyrgdina av, at fleiri túsund jødar liva í sorg, legði Itamar Ben Gvir afturat og sipaði til, at forsætisráðharrin fyrr í ár noyddi umleið 8.000 jødiskar niðursetumenn úr Gaza-geiranum.

Men palestinararnir, sum hava yvirtikið valdið í geiranum, harmaðust heldur ikki um, at ísraelski forsætisráðharrin var fluttur á sjúkrahús. Nógvir víðgongdir palestinar runnu út á gøturnar sunnukvøldið og fagnaðu tíðindunum, samstundis sum teir róptu bønarorð til Allah um, at Sharon skuldi doyggja, skrivar AP.

Sharon bleiv fluttur á eitt sjúkrahús í Jerusalem seinnapartin sunnudagin. Hann hevði kent seg illa, og á veg til sjúkrahúsið misti hann vitið. Læknarnir staðfestu, at hann hevði havt ein hjartatilburð. Seinni um kvøldið vistu ísraelsku fjølmiðlarnir tó at siga, at Sharon var batnaður, og at hann var komin aftur á føtur. Í gjár skuldi hann til ymsar kanningar á sjúkrahúsinum, áðrenn hann kundi sleppa útaftur.



*Víðgongdir jødar og víðgongdir palestinar vónaðu, at Sharon doyði av hjartatilburðinum, sum hann fekk sunnukvøldið*
*Mynd: Reuters*

# Bill, Melinda og Bono

**Hjúnini Bill og Melinda Gates og Bono eru ársins nøvn í 2005, heldur tíðarritið Time Magazine**

TILNEVNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Time Magazine tilnevnir á hvørjum ári ein ella fleiri persónar sum tann ella tey, ið hava gjørt ein serligan mun í árinum, sum fer. Í 2003 fall valið á amerikanska hermannin, í fjør var tað George W. Bush, forseti.

Í ár hevur tíðarritið valt at heiðra Microsoft-ríkmannin Bill Gates, konu hansara Melindu og írska rocksangaran Bono, sum øll verða heiðrað fyri teirra ótroyttiliga arbeiði fyri at hjálpa teimum fátæku í heiminum. Sagt verður, at Bill og Melinda Gates hava skipað heimsins største vælgerðargrunn, sum hevur savnað einar 200 milliardir krónur, og sum hevur bjargað minst 700.000 fólkum í heimsins fátækastu londum.



*Bono á U2-konsert í New York*
*Mynd: Reuters*

Um Bono verður sagt, at tað var serliga honum fyri at takka, at leiðararnir í heimsins ríkastu londum samdust um at strika 250 milliardir krónur av skuldini hjá teimum fátækastu londunum. Bono fær eisini rós fyri sín lut í ársins "Live 8" konsertum.

## Lønirnar lítið hækkaðar

Hóast tað hevur ginið væl við í danska búskapinum, og hóast tørvur er á arbeiðsmegi, eru lø'nirnar á danska arbeiðsmarknaðinum lítið hækkaðar samanborið við hini ES-londini.

Hagstovan hjá ES, Eurostat, sigur, at tað seinasta árið er lønarlagið í Danmark hækkað 2,3 prosent, og tað er tann triðlægsta hækkingin í øllum teimum 25 limalondunum. Bara í Týsklandi, Portugal og Malta er lønin hækkað minni enn í Danmark. Í Bretlandi er hækkingin í sama tíðarskeiði 4,2 prosent, Í fraklandi 2,8 og í Svøríki 2,6 prosent, sigur Eurostat.

Peter Birch Sørensen, professari og yvirvísmaður, sigur við danska útvarpið, at arbeiðstakarar eru bangnir fyri, at teirra arbeiðspláss verða flutt úr Danmark, og at teir tí aftra seg við at krevja hægri løn.

## Bóndin vann

Sum væntað vann tann vinstrasinnaði bóndin Evo Morales forsetavalið í Bolivia sunnudagin. Sambært valnevndini fekk hann 50,6 prosent av atkvøðunum, meðan næsti kappingarneyti hansara, tann borgarligi Jorge Quiroga, fekk góð 30 prosent. Evo Morales er av indiánskum uppruna, og hann er tann fyrsti indiánin, sum er valdur til forseta í Bolivia, sjálvt um 75 prosent av fólkinum eru av teimum trimum stóru indiánaættunum quechua, aymara og guaraní.

Sjálvur hevur tann nývaldi forsetin sagt, at vann hann valið, var tað tað ringasta, sum kundi henda fyri USA. Tað kemst serliga av hansara vinstrasinnaðu sjónarmiðum, og Morales hevur eisini sagt, at hann ætlar sær at arbeiða saman við hinum vinstrasinnaðu leiðarunum í Suðuramerika, Lula í Brasil og Chavez í Venesuela. Men amerikanska mótstøðan ímóti honum kemst eisini av, at hann hevur gjørt greitt, at hann fer at loyva bøndrunum at dyrka koka-plantuna, sum verður brúkt til rúsevnið kokain. Tað hóvar amerikonsku stjórnini illa, tí hon hevur roynt at fáa Bolivia, Kolombia og Peru at nokta bøndrunum at dyrka kokaplantuna fyri at steðga teirri stóru rúsevnissmuglingini úr teimum trimum londunum til USA.

Eitt annað, sum ger, at Evo Morales er illa umtóktur í Washington, er ætlan hansara at krevja meiri skatt frá teimum altjóða feløgunum, sum útvinna gass í Bolivia. Hann hevur eisini sagt, at vilja feløgini ikki gjalda meiri skatt, verða tey snøgt sagt tjóðartikin.

## Kikwete vann

Sunnudagin var eisini forsetaval í afrikanska landinum Tanzania, og har gjørdist úrslitið, at Jakaya Kikwete vann stórsigur. Hann fekk ikki minni enn 80 prosent av atkvøðunum.

Kikwete stillaði upp fyri stjórnarflokkin, og longu undan valinum var tað greitt, at hann fór at vinna. Hansara einasti veruligi kappingarneyti fekk bara góð 11 prosent av atkvøðunum. Forsetin fær heldur ongar trupulleikar í tinginum, tí á tjóðartingsvalinum seinasta mikudag fekk flokkur hansara 206 av teimum 232 tingsessunum.

Jakaya Kikwete tekur við forsetaembætinum eftir Benjamin Mkapa, sum hevur verið forseti tey bæði seinastu valskeiðini, og sum ikki kundi stilla upp hesaferð, tí sambært lógini kann forsetin í Tanzania ikki sita meiri enn tvey valskeið. Tað er sama skipan sum í USA.

## Fullir jólamenn

40 fullir menn í jólamansbúna herjaðu um vikuskiftið handlar og skrivstovur í býnum Auckland í Ný Sælandi. Trygdarmenn royndu at steðga teimum, men jólamenninir settu hart ímóti hørðum við tí úrsliti, at minst ein trygdarmaður mátti á sjúkrahús.

Tá teir fullu jólamenninir hildu seg hava gjørt nóg mikið um seg í handilsgøtuni, royndu teir at sleppa umborð á eitt farmaskip, sum lá og lossaði. Eisini her royndu trygdarmenn at forða teimum óbodnu gestunum, og tað endaði við hørðum samanbrsetum, sigur løgreglan í Auckland við AP.

Talsmaðurin hjá teimum ógvusligu jólamonnunum, Alex Dyer, sigur við tíðindastovuna, at tiltak teirra var ætlað sum eitt mótmæli ímóti, at jólini eru vorðin ein handilshátíð heldur enn tann upprunaliga kristna hátíðin.